Føroysk ferðavinna í London:

# Selja Føroyar í felag

**Ferðaráðið, Atlantsflog og Smyril Line eru samd um, at tað loysir seg best at umboða Føroyar í felag, tá tey eru uttanlands og royna at skapa áhuga fyri Føroyum. Týsdagin vóru umboð fyri bæði feløgini og Ferðaráðið á fundi í London**

FERÐAVINNA
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*
*London*



*Samuel J. Arnoldson frá Smyril Line, Kent Christensen frá Atlantsflog og Inga Foldbo Hjalnafoss frá Ferðaráðnum vóru týsdagin á ferðavinnufundi í London og roydu at skapa áhuga fyri Føroyum*

*Saman standa vit sterkast.*

Hetta slagorðið eru tey trý, Samuel J. Arnoldson frá Smyril Line, Kent Christensen frá Atlantsflog og Inga Foldbo Hjalnafoss frá Ferðaráðnum samd um. Týsdagin vóru tey í London á fundi hjá Dansk Turistråd og royndu at skapa áhuga fyri Føroyum.

Hóast Smyril Line og Atlantsflog hvør í sínum lag flyta ferðafólk úr útlondum til Føroya, halda tey, at tað loysir seg best at partrola uttanlands eftir ferðafólkunum. Tí hava tey eisini felags bás, tá tey eru á ferðavinnustevnum kring um í heiminum. Og feløgini eru serstakliga fegin um, at Ferðaráðið eisini er við og upplýsir meira alment um Føroyar.

## Mest um Danmark

Fundurin á Greast Eastern Hotel í Liverpool Strett her í London snúi seg nærum bert um Danmark. Tá Sosialurin vitjaði á fundinum, helt stjórin fyri Dansk Turistråd fyrilestur. Og hóast vit royndu at fylgja væl við, hoyrdu vit hann bert einaferð nevna Føroyar í einum hjásetningi.

Heldur ikki á borðinum hjá Dansk Turistråd lá nakar faldari um Føroyar millum dungarnar av faldarum um Danmark.

Men sambært umboðunum fyri føroysku ferðavinnuna, er tað ikki hetta, ið er avgerandi.

## Hittu keyparar

Slíkir fundir, sum tann í London týsdagin er soleiðis skipaðir, at tíð verður sett av, so ymsir keyparar og ymsir veitarar kunnu hittast at tosa um samstarv. Og tað er hetta, ið er avgerandi fyri føroysku umboðini, tá tey vitja á slíkum ferðavinnufundum.

Týsdagin sluppu føroyingarnir eisini at hitta keypararar ymsastaðni frá. Og møtti Atlantsflog onkrum, ið var áhugaður í ferðum við ferjum, vísti marknaðarleiðarin hjá Atlantsflog til Smyril Line, eins og Smyril Line gjørdi øvugt.

— Hetta er besti mátin, vit kunnu fáa nakað burtur úr, eru tey trý samd um.

# Suðuroyggin ferðavinnubúgvin

**Hóast tað óivað mangan er trupult hjá ferðafólki í Føroyum, so eru umstøðurnar betraðar seinnu árini. Í Suðuroynni hevur Vágs Matmøðrafelag fjøltáttað virksemi og hevur m.a. tikið stig til at gera tað lættari hjá ferðamanninum**

FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*

Mangan hevur helst verið strævið at verið ferðafólk í Føroyum. Einum landi, har ferðavinnan seinnu árini hevur fingið fótin fyri seg. Men framvegis er í mongum støðum soleiðis, at lítið er at bjóða teimum vitjandi, einki stað at sova, einki tjaldpláss, einki alment wc og so framvegis.

## Fjøltáttað virksemi

Hóast nógv ikki hevur verið frammi um tað, heldur ikki tá ferðavinna í Suðuroynni hevur verið umrødd, so hevur seinnu árini verið bøtt um viðurskiftini hjá ferðafólki í Suðuroynni. Vágs Matmøðrafelag er millum teirra, ið hava tikið stig til ábøtur í sunnaru helvt av oynni.

- Matmøðrafelagið hevur ymiskt at bjóða ferðamanninum. Umframt gisting, so eru eisini wc-møguleikar, eins og bað- og vaskimøguleikar, sigur Elin Jacobsen, forkvinna í Vágs Matmøðrafelag.

Vágs Matmøðrafelag er felag við fjøltáttaðum virksemi. Felagið skipar fyri tiltøkum og hevur gingið á odda á ymsum økjum.

Fremstu og sjónligastu varðar felagsins, eru tó Matmøðrafelagshúsini og Suðuroyar Heimavirki. Matmøðrafelagið rekur handil og hevur fyri fáum árum síðani latið byggja nýggj og stásilig handilshús. Í húsunum rekur felagið handil, Suðuroyar Heimavirki, og er hetta fjøltáttaður handil, har umframt vanligu heimavirkisvørurnar, eisini fáast bøkur, skrivstovuútgerð, heilivágur og annað.

## Til ferðamannin

Á loftinum í húsunum er hugnalig kaffistova. Tá húsini vóru bygd, setti Matmøðrafelagið sær fyri at gera okkurt munagott fyri ferðamannin. Hetta var í samráð við kommununa. Gomlu handilshúsini vórðu tikin niður. Bygt var soleiðis, at í kjallaranum er wc, umframt at vitjandi kunnu fara undir brúsu og eisini ber til at vaska og turka sær klæðir.

Júst hesi viðurskiftini hava ligið á láni í Føroyum sum heild og enn eru ikki allar bygdir, ið kunnu bjóða slík viðurskifti - so sum alment wc - fram.

## Eisini gisting

Vágs Marmøðrafelag hevur eisini egin felagshús. Húsini eru í fleiri hæddum. Umframt at vera karmur um sjálvt felagið, verður eisini skipað fyri ymsum, t.d. dagtilhald, her møguleiki er hjá eldri fólki at hittast.

Vanligt er eisini at leiga húsini út til gisting til ferðaløg. Hetta er galdandi alt árið og er hetta t.d. ofta komið væl við hjá ítróttarfólki. Men um summarið vitjað eisini føroyingar í egnum landi, umframt at útlendingar sjálvsagt eisini leggja leiðina til Vágs, um enn ferðasambandið við oynna ger tað heldur trupult.

Forkvinnan í Vágs Matmøðrafelag sigur, at rættiliga nógv virksemi er viðvíkjandi útleigan av felagshúsunum og er hetta sjálvsagt gleðiligt.

Í Vági og Suðuroynni nýtist ongum ferðamanni at standa ráðaleysur, tí allir hentleikar eru til taks, nú summarið er komið og ferðavinnan er í hægsta blóma.



# Karsten hevur sítt á tí turra

**Tað eru Undirvísingar- og Mentamálastýrið og fyrrverandi landsstýrismaðurin, sum ikki hava lagt nóg stóra orku í at finna pengar til Læraraskúlan, sigur løgmaður. Tað fekk Stýrið annars boð um frá Fíggjarmálastýrinum longu í februar, sigur hann**

PENINGATROT
*Edvard Joensen*



*Løgmaður sigur, at tað er Undirvísingar- og Mentamálastýrið, sum er orsøkin til, at málið um Føroya Lærarakúla er komið har til, tað nú stendur. Tað varð arbeitt ov seint við at finna pengarnar til Lærarakúlan á játtan hjá Stýrinum sjálvum, sigur hann*

*Mynd: Edvard Joensen*

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur gjørt ov lítið fyri at finna pengar á egnari játtan til Lærarakúlan, sigur løgmaður. Stýrið bað í februar Fíggjarmálastýrið um eykajáttan til Føroya Lærarakúla, men fekk longu tá at vita, at teir pengarnar kundi Fíggjarmálastýrið bara lata, um Undirvísingar- og Mentamálastýrið kláraði at spara teir inn aftur á aðrari konto hjá Stýrinum.

Tann sparingin er ikki komin fyrr enn nú, tað er líkt til, at Lærarakúlin ikki kann taka nakran nýggjan flokk inn orsakað av peningatroti.

Eykajáttanin, sum nú er latin Føroya Lærarakúla við fíggjarnevndarskjali, eru somu pengar, sum vóru settir av til at varðveita gamla býlingin i Koltri fyri.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur flutt pengar millum tvær konti hjá Stýrinum, soleiðis at útreiðslan, sum stendst av trotinum hjá Lærarakúlanum, gerst neutral dyri Undirvísingar- og Mentamálastýrið.

Tað at bjargingin av Lærarakúlanum er útreiðsluneutral, er eftir kravi frá Fíggjarmálastýrinum. Og tað kravið setti Fíggjarmálastýrið Undirvísingar- og Mentamálastýrinum longu í februar mánaða. Men Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur so ikki fyrr enn nú funnið pengingin á aðrari konto.

## Fráboðan í februar

Petur Petersen, aðalstjóri í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, sigur, at Stýrið í skrivi til Fíggjarmálastýrið tann 12. februar gjørdi vart við, at Lærarakúlanum fór at tørva eina hálva millión krónur fyri at fáa raksturin at hanga saman. Fekk skúlin ikki hesa hálvu milliónina, varð fryktandi fyri, at eingin flokkur varð tikin inn á skúlan komandi skúlaár. Tí varð Fíggjarmálastýrið biðið um at lata Føroya Lærarakúla hesa hálvu milliónina aftrat. Men tað gjørdi Fíggjarmálastýrið so ikki.

Ymiskt hevur síðan verið frammi í hesum máli, og nú er eisini løgmaður komin uppí.

Í skrivi til landsstýrismannin við undirvísingar- og mentamálum dagfest tann 18. juli 2001 sigur løgmaður frá, at landsstýrið hevur samtykt, at taka undir við umsókn frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum um at lata Føroya Lærarakúla eina eykajáttan upp á 500.000,- krónur. Grundgevingin hjá løgmanni er, at um hendan játtan ikki verður latin, verður helst eingin flokkur tikin inn, og so er jú eingin meining í at hava skúlan, sigur løgmaður í viðmerking við Sosialin.

Løgmaður sigur í skrivinum til landsstýrismannin við undirvísingar- og mentamálum, at landsstýrið á ongan hátt kann góðtaka, at játtanartrupulleikar, sum áttu at verið eyðsýndir fyri langari tíð síðan, gerast bráðfengistrupulleikar.

Víðari sigur løgmaður í skrivinum, at hann vil hava málið kannað av uttanfyristandandi persóni og vil eisini hava úrslitið at vita, beinanveg kanningin er liðug.

Tað hevur verið frammi, at tað er landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, sum hevur verið afturhaldandi við at játta pengarnar til Lærarakúlan. Roynt varð at fáa viðmerking til málið frá Karsteni Hansen, men tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar.

## Karsten ósekur

Men løgmaður sigur í viðmerking, at tað er ikki heilt rætt, at tað er landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, sum hevur ligið í buktini.

Tá Undirsívingar- og Mentamálstýrið í februar bað um hasa hálvu milliónina til Lærarakúlan, varð svarið frá Fíggjarmálastýrinum, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið sjálvt mátti finna pengarnar á egnari játtan, soleiðis, at veitingin til Føroya Lærarakúla gjørdist útreiðsluneutral.

Tað gjørdi Undirvísingar- og Mentamálastýrið ella táverandi landsstýrismaðurin ikki. Og sostatt komu vit heilt langt út í juni mánaða, uttan at Lærarakúlin hevði nokk av pengum at arbeiða við, sigur løgmaður.

Men nú stóð so nógv á, at tað so at siga stóð um lív, og tá bar til at flyta eina hálva millión millum konti hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Nærri ásett av kontoini til varðveitan av gamla býlinginum í Koltri til Føroya Lærarakúla.

– Hevði Undirvísingar- og Mentamálastýrið og avvarðandi landsstýrismaður funnið hasar pengarnar í februar, sum Fíggjarmálastýrið bað um, høvdu teir verið játtaðir beinanveg tá. Tað er eingin ivi um tað, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður. Og so høvdu vit eisini verið sloppin undan hesum stríðnum, sum nú hevur verið.



*Peningurin, sum nú skal bjarga Føroya Lærarakúla, er tikin av kontoini til varðveitan av gamla býlinginum í Koltri*